# Nýggjur PW-handil letur upp á Skála

**Í dag, 8. februar, lata feðgarnir, Petur Eirik og Hans Jørgen Djurhuus, nýggjan handil upp á Skála. Handilin húsast í miðhæddini í bygninginum, har JOMA á Skála hevur verið seinastu árini. Hetta er annar PW-handilin, sum teir báðir hava í Eysturoy**



*PW-handilin, sum letur upp á Skála í dag, er annar PW-handilin hjá feðgunum báðum, Hans Jørgeni og Petur Eiriki, í Eysturoy. Í Havn og á Argjum hevur Petur Eirik tveir PE-handlar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

NÝGGJUR HANDIL

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nýggi handilin á Skála er tann fjórði handilin í røðini hjá søldfirðinginum, Petur Eiriki.

Handilin, sum hann hevur á Heykavegi í Havn og handilin á Argjum, eru kendir undir navninum, PE, sum stendur fyri Petur Eirik. Handilin í Norðragøtu, sum hann eigur saman við soninum, Hans Jørgeni, eitur PW og handilin, sum í dag letur upp á Skála, fer eisini at kallast PW. Eins og í Norðragøtu, eru feðgarnir eisini saman um handilin á Skála.

PW er gamla navnið á handlunum í Søldarfirði, sum ættfedrarnir hjá Petur Eiriki og Hans Jørgeni áttu í næstan hundrað ár.

– Vit hava valt at kalla handlarnar í Eysturoy PW – og ikki PE.

Petur Eirik ásannar, at hetta hevur nakað við kenslur og fortíðina at gera, og hann heldur, at fólk í Eysturoy eru fegin um at síggja gamla handilsnavnið aftur á skeltinum.

## Størri úrval

Hann sigur, at handilin á Skála fer at hava eitt størri vøruúrval enn handilin, JOMA, sum læt aftur, 28. januar í ár.

– Hetta verður ein vanligur matvøruhandil við øllum vanligum gerandisvørum. Handilin verður partur av ketuni, Samkeypi, eins og hinir tríggir handlarnir, sum vit hava.

Petur Eirik sigur, at opið verður vanligar dagar frá klokkan 8-22, leygardag frá klokkan 9-22, og sunnudag verður stongt.

Leiðari í handlinum á Skála verður fuglfirðingurin, Palli Vang, sum er útbúgvin bankamaður og í nøkur ár hevur arbeitt hjá FDB, sum er ein Keypssamtøka í Keypmannahavn. Aftrat leiðaranum, verða trý fólk í føstum starvi á Skála, umframt eini seks ungfólk, sum skiftandi fara at hjálpa til.

## Á Selatrað

Petur Eirik veit at siga, at áhugin fyri handilsvirksemi liggur langt, langt afturi í familjuni.

– Tann fyrsti handilsmaðurin í familjuni, sum vit vita um, var Andrias Djurhuus, sum handlaði á Selatrað. Eg havi skilt, at hann var tipp-oldurabbi mín. Í Søldarfirði vóru bæði langabbi, abbi og pápi mín handilsmenn. Pápi og mammubeiggi, Hans Erik Djurhuus og Hans Alberg Weihe, yvirtóku handilin og róku bæði handils-og reiðaravirksemi. Í sínari tíð skapti handilin nógv arbeiði í Søldarfirði, tí fiskaarbeiði var eisini knýtt at hesum virksemi.

Tað var 8. mars 1983, at Petur Eirik læt sín fyrsta PE-handil upp. Hetta var í Stoffalág í Havn. Handilin húsaðist í somu hølum, til hann flutti á Heykaveg á Hálsi í Havn, 28. apríl í fjør.

Petur Eirik stendur sjálvur fyri dagligu leiðsluni á Heykavegi.

Annar PE-handilin hjá Petur Eiriki læt upp á Argjum, 14. mai 2002, og dagligur leiðari á Argjum er Ingi Ørvarodd, sum býr í Havn.

PW-handilin í Norðragøtu eigur Petur Eirik sum nevnt saman við soninum, Hans Jørgeni, og har situr Hans Jørgen við dagligu leiðsluni.

Vit ynskja feðgunum báðum góða eydnu og góðan byr, nú latið verður upp á Skála í dag.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 6, 2005
www.kaupthing.fo

# Dollarin kann styrkjast

MARKNAÐARRÁK

Farna vika var full av áhugaverdum lyklatølum, sum hvør sær vanliga klára at flyta marknaðirnar, um tey ikki verða heilt sum væntað. Men marknaðirnir vóru sera friðarligir, tí íleggjarar bíðaðu eftir fríggjadegnum, tá amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fyri januar mánaða varð kunngjørd. Hon er enn ein tann týdningarmesta hendingin hvønn mánað. Hesaferð var hon serliga áhugaverd, tí undanfarna frágreiðingin fyri desembur gav eina nakað blandaða mynd av búskapinum.

Frágreiðingin umfatar arbeiðsloysisprosent, tímaløn, arbeiðstímar, nýggj størv í framleiðsluídnaðinum, og so tað sum mest verður hugt at, nevniliga talið á nýggjum størvum uttan fyri landbúnaðin. Í januar komu 146.000 tílík nýggj størv, og marknaðirnir væntaðu 200.000. Harafturat varð talið fyri desembur lækkað við 24.000. Av tí, at hetta var verri enn væntað, fekk tað renturnar at lække. Partabrøv broyttust tó einki serligt, og tað er eisini týdningarmikið at halda sær fyri eyga, at 146.000 nýggj størv er á leið nokk til, at talið á nýggjum størvum fylgir við vøkstrinum í fólkatalinum.

Norrønu partabrævamarknaðirnir stóðu seg væl í farnu viku og vóru ikki ávirkaðir av vánaligu arbeiðsmarknaðarfrágreiðingini. Teir hækkaði sløk 3%, og Vestas hækkaði heili 6,6%, tá gitingar vóru frammi um, at stórar bíleggingar eru á veg úr Avstralia og Spania.

Umframt Ericsson, so kunngera fleiri av teimum norrønu bankunum hesa vikuna roknskapir sínar, m.a. SEB og Danske Bank. Fyritøkurnar Cisco og Dell kunngera eisini, og hesir kunnu ávirka partabrævagongdina hesa vikuna.

Einki í løtuni bendir á, at partabrøv ikki skulu standa seg væl framyvir.

Hendan vikan verður soltin hvat viðvíkir lyklatølum. Tey mest áhugaverdu verða amerikanski handilsjavnin fyri januar, týsk ídnaðarframleiðsla, og mánaðarliga frágreiðingin frá evropiska miðbankanum, ECB, fyri februar. Marknaðirnir vænta at undirskotið á amerikanska handilsjavnanum minkar eitt sindur. Handils- og gjaldsjavnahallið leggja trýst á dollaran. Í vikuskiftinum segði Greenspan, formaður í amerikanska tjóðbankanum, at gjaldsjavnahallið kann koma í eina fasta legu, og um handilsjavnin er betraður í januar, kann hetta styrkja dollaran eitt styttri tíðarbil.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig | |
|---|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% | → |
| 2 ára lánsbræv | 2,41% | -0,02% | ↓ |
| 5 ára lánsbræv | 2,96% | -0,02% | ↓ |
| 10 ára lánsbræv | 3,59% | -0,08% | ↓ |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| KFX, Danmark | 297,2 | 2,6% | ↑ |
| OMX, Svøríki | 755,6 | 2,8% | ↑ |
| Eurostoxx 50, Evropa | 3.037,1 | 2,7% | ↑ |
| S&P 500, USA | 1.203,0 | 2,7% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 107,16 | 0,2% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 172,69 | 0,3% | ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 88,01 | 3,1% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 60,44 | 0,9% | ↑ |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 5,78 | 1,3% | ↑ |
| EUR | 7,44 | 0,0% | → |
| GBP | 10,85 | 0,7% | ↑ |
| NOK | 0,90 | -0,4% | ↓ |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*